# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## NÁTTARKAVING Í TJØRNUVÍK

Faroe Dive skipar fríggjakvøldið fyri náttarkaving við lendingina í Tjørnuvík. Tey, ið hava hug at snorkla, eru eisini vælkomin til tiltakið. Tað er Faroedive, sum skipar fyri, og á heimasíðuni hjá teimum kann lesast meira um tiltakið.

**NÁTTARKAVING Í TJØRNUVÍK**
Fríggjakvøldið 8. oktober



## BEATLES Í ORÐUM OG TÓNUM

Trý Beatles kvøld eru í Føroyum í hesum døgum. Hetta eru kvøld, har mæti poppbólkurin úr Liverpool verður lýstur í orðum og tónum. Stanley Samuelsen spælir Beatles-sangir, og Per Wium, sum hevur skrivað bók um bólkin, greiðir frá.
The Beatles í orðum og tónum

**RIBARHÚS Í FUGLAFIRÐI**
Fríggjakvøldið 8. oktober kl. 20



## AMARIEL 65 ÁRA FRAMSÝNING

Amariel Norðoy hevur komandi dagarnar framsýning í Galerie Focus í sambandi við, at hann verður 65 ár. Ferniseringin er leygardagin, og framsýningin er opin til 14. oktober. Listamaðurin úr Klaksvík, sum er búsitandi í Havn, hevur seinnu árini arbeitt nógv við teaminum Útróðrarbørn.

**AMARIEL NORÐOY**
**GALERIE FOCUS Í HAVN**
Leygardagin 9/10 kl. 16-

## PIRANHA Í 3D

Várferian endar við ruðuleika í lítla býnum Lake Victoria. Túsundtals ungfólk skulu taka sær av løttum, men ræðuleikin lúrir í havinum. Ballini verða alt í einum til blóðbað, og Elisabeth Shue, sum er sheriffurin, sum fer í stríð við piranhurnar í sjónum og roynir at bjarga millum annað sínum egnu børnum.

**PIRANHA 3D**
Havnar Bio
Frá hósdegnum 7. oktober



## LENNON-KVØLD Í KLAKSVÍK



Leygardagin eru liðin 70 ár, síðani John Lennon varð borin í heim í Liverpool. Í tí sambandi verður skipað fyri tiltakið í Spaniastovu í Klaksvík. Har fer Bergur Rasmussen at greiða frá um tónleikaran úr Liverpool, og bólkurin X-mas fer at spæla Lennon sangir saman við kendum gestatónleikarum – teirra millum eru Hanus G. Johansen, Karl Martin Samuelsen og Janus Petersen.

**LENNON KVØLD**
Spaniastova í Klaksvík
Leygarkvøldið 9. oktober kl. 20

## STÓRT TRÝST Á PORTUGAL

Tað hevur gingið sera illa hjá portugisiska fótbóltslandsliðnum seinasta árið, og landið hevur eisini fingið vánaliga byrjan í nýggjari undankapping. Nú hevur Portugal skift venjara, og fríggjakvøldið fáa teir vitjan av danska landsliðnum.upp til spenning, rok og intriger.

**PORTUGAL-DANMARK**
**EM-FÓTBÓLTUR**
TV2 fríggjakvøldið
8. okt. kl. 20.45






## TÁ MAMMA DOYR

Í nýggjari bók greiða átta kvinnur í ymsum aldri frá, hvussu tað var at missa mammu sína. Søgurnar eru ymiskar, men tær hava eisini felags eyðkenni. Kvinnurnar siga frá um sorg og stúran og um staðfestingina, at mamman fer altíð at mangla.

**NÁR MOR DØR**
Forlaget Turbulenz